


*Í Vágsbotni verður flótandi framsýning við bátum og ymiskari útgerð, og á bryggjuøkinum verður eisini tjald, har fólk kunnu keypa sær mat og okkurt leskandi. Ætlanin er, at tónleikur og kafé skulu seta sín dám á Tórsgøtu, meðan NAFF varir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Framsýning, matur og mentan

**Sum liður í North Atlantic Fish Fair verður flótandi framsýning, matur og mentan á skránni í Vágsbotni og Tórsgøtu frá hósdegi til og við leygardag**

**STEVNUHÝRUR**

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Hetta er aðru ferð, at Tórshavnar kommuna verður vertur fyri altjóða fiskivinnuframsýningini North Atlantic Fish Fair, sum Sp/f Atlantic Fair stendur aftanfyri.

Høvuðsframsýningin verður eins og seinast í stóru høllini hjá Poul Mohr á Hjalla, men ymisk tiltøk verða eisini í Vágsbotni, har høvi eisini verður at síggja eina flótandi framsýning við bátum og ymiskari útgerð.

Tað eru føroyskir útbjóðarar, sum fara at sýna fram í Vágsbotni.

### Matur og mentan

Tá Fish Fair blaðið, sum tygum sita við í hondini nú, fór til prentingar mánakvøldið, var ikki heilt greitt, hvussu tiltøkini í Vágsbotni og Tórsgøtu verða skipað, men í Tórshavnar kommunu arbeiddu tey tá við eini skrá fyri dagarnar, sum stevnan varir.

Talan verður í fyrsta lagi um mentanarlig tiltøk av ymiskum slagi við serligum atliti at tónleiki og kafé.

Luturin hjá Sp/f Atlantic Fair í Vágsbotni snýr seg í høvuðsheitum um framsýningina við bátum, reiðskapi og tøkni, og soleiðis skipar felagið eisini fyri mati og skeinking í tjaldi, sum verður sett upp á bryggjuni.

Fyribils er talan um eitt tjald, sum er 100 fermetrar stórt, men tað hevur verið upp á tal at seta eitt uppaftur størri tjald upp.

Í tjaldinum fer Hotel Føroyar at skipa fyri við ymiskum fiskamati og skeinking, um fólk ynskja sær okkurt leskandi.

### Út á kvøldið

Sjálv flótandi framsýningin í Vágsbotni er opin somu tíðir, sum NAFF er opin á Hjalla, nevniliga millum klokkan 10 og 17, men ætlanin hjá fyriskipar-unum er, at fólk skulu kunna leita sær oman í Vágsbotn, tá dagurin á Hjalla – fer at halla.

Ætlanin er, at matsøla og skeinking verður til einaferð út á kvøldið, men sjálv skeinkingin skal sambært treytunum halda uppat klokkan 22, skilst.

# JT Electric syrgir fyri el-veiting

**NAFF**

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Tað er el-fyritøkan á Kambsdali JT-Electric, sum syrgir fyri, at allir framsýnararnir á NAFF fáa el inn á sínar básar.

Tá vit vóru á Hjalla mánamorgunin, vóru menn hjá JT-Electric í holt við ymiskar instalatiónir.

- Vit eru tveir mans í løtuni, men verða ivaleyst fleiri, tá setanin stundar til, segði maðurin, sum vit hittu.

Tað er Team 85, sum stendur fyri standard-básaskipanini á NAFF, og fyritøkan hevur úr at gera í hesum døgum, nú alt skal fáast upp á pláss.

Summir framsýnarar hava sínar egnu plátur at seta í básaskipanina hjá Team85, og aðrir hava designað sín egna bás.

Dánjal Petur Hansen, samskipari, sigur, at eini 100 fólk verða í gongd uppi á Hjalla komandi dagarnar og so hvørt, sum setanin nærkast, verður talið uppaftur størri.

- Vit hava at kalla eingi avboð fingið, og nú er so fult, at kanska eru eini tvey lítil horn eftir í høllini, sigur samskiparin.

---

Virkandi borgarstjórin, Jógvan Arge:

# NAFF er eitt flott tiltak

**- Tað er flott, at fyriskipararnir megna at reisa eitt so stórt tiltak á føtur, heldur virkandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jógvan Arge, sum fer at siga nøkur orð undir setanini**

**NAFF**

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Jógvan Arge er virkandi borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, nú Heðin Mortensen er burturstaddur.

Jógvan sigur seg fegnast um, at góðir karmar eru í kommununi at hýsa eini slíkari altjóða fiskivinnustevnu, sum North Atlantic Fish Fair er.

- Eg vitjaði á stevnuni, tá hon var í høvuðsstaðnum fyri tveimum árum síðan, og eg gjørdist rættiliga ovfarin av at síggja, hvussu væl framsýningin tók seg út.

Hann heldur tað vera sera heppið, at slík høll er í kommununi, sum kann hýsa einum so stórum tiltaki undir einum og sama taki.

- Hetta kemur ógvuliga væl við og gevur góðar karmar, tá skipað verður fyri tiltøkum av hesi støddini í høvuðsstaðnum, sigur hann.

### Løgmaður setir

Við setanina, sum verður fyrrapartin hósdagin, fer Dánjal Petur Hansen at bjóða fólki vælkomnum til setanina, og síðan fer Jógvan Arge sum virkandi borgarstjóri at bjóða stevnuluttakarum og stevnugestum vælkomnum til høvuðsstaðin.

Tað verður Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum alment fer at seta hesa fjórðu North Atlantic Fish Fair framsýningina.

- Eg haldi, at tað er flott, at fyriskipararnir megna at reisa eitt so stórt tiltak á føtur, og vegna Tórshavnar kommunu eri eg fegin um at kunna bjóða gestum – bæði nær og fjar – á hesa stevnu og framsýning, sigur Jógvan Arge, virkandi borgarstjóri.



*- Eg vitjaði á North Atlantic Fish Fair, tá hon var í høvuðsstaðnum seinast, og eg gjørdist rættiliga ovfarin av at síggja, hvussu væl framsýningin tók seg út, sigur Jógvan Arge, virkandi borgarstjóri*